# Vágbingar vilja ikki hava skyldina

**Hósdagin varð rækjutrolarin Hvannaberg úr Vági hildin aftur í Havnini tað mesta av degnum fyri at hava dálkað Havnarvág olju og hann fer nú at senda Tórshavnar Kommunu rokning mista fiskitíð**

UMHVØRVISDÁLKING
*Áki Bertholdsen*



*Tá ið Hvannaberg úr Vági bunkraði olju í Havn mikudagin, fleyt yvir. Men reiðarin góðtekur ikki, at hetta er blást upp til at vera eina gølu. Hvannaberg skal ikki gerast til syndabukk, tí trupulleikar hava verið av oljudálking í Havnini í fleiri vikur nú, sigur Jákup Olsen*

– Vit hava viðgingið, at tað fleyt yvir, tá ið ið vit tóku olju. Men at geva okkum skyldina fyri at hava dálkað alla Havnarvág við olju, finna vit okkum ikki í.

Jákup Olsen er reiðari á rækjutrolaranum Hvannaberg og hann er í øðini inn á tíðindini í sjónvarpinum hóskvøldið um at teir skuldu havt elvt til stóra oljudálking á Havnarvág.

Jákup Olsen sigur, at tað varð tikið so rívan til, at tað kom bæði løgregla, býráðslimir, sakførari og sjónvarpið upp í leikin.

– Avleiðingin av hesum var, at vit vórðu gjørdir til syndabukk fyri oljudálkingina á Havnarvág, samstundis sum Hvannaberg varð afturhildin í fleiri tímar.

– Vit skulu nokk betala fyri tað dálking, vit hava elvt til. Men vit fara eisini at senda Tórshavnar Kommunu rokning fyri mista fiskitíð, sigur Jákup Olsen.

– Men vit fara ikki at gjalda fyri dálking, sum onnur hava elvt til, leggur hann afturat.

– Og tað er ein sannroynd, at Havnarvág hevur verið plágað av oljudálking í fleiri vikur nú. Sostatt er trupulleikin gamal og tí er tað skeivt at gera Hvannaberg til syndabukk.

– Tað skerst heldur ikki burtur, at tað vóru nógv onnur skip á havnini og bunkraði olju, men tað var ikki nógv olja at síggja rundanum Hvannaberg, sum lá ytst á keiini.

Reiðarin veit ikki, hvat er gjørt fyri at kanna, um olja er likin úr øðrum skipum.

### Fleyt yvir

Jákup Olsen sigur, at tá ið Hvannaberg bunkraði olju mikudagin, hendi tað óhapp, at tað fleyt yvir, hóast maður helt vakt.

– Maðurin, sum koyrdi oljubilin, varð varskógvaður beinanvegin og skrúvaði fyri alt fyri eitt.

Hann sigur, at menn eru ójavnir á máli um, hvussu nógv var farið á sjógv. Summir hildu, at eitt tons av farin á sjógv, aðrir hildu bara nakrir fáir litrar.

– Oljuna, sum varð runnin á dekkið, fingu vit í tunnur.

Jákup Olsen sigur, at tá ið hann kom á staðið, stóðu bæði býráðslimir, embætisfólk hjá býráðnum, sakførarin hjá býráðnum og løgreglan á keiini.

Hann dylir ikki fyri, at hann følir seg illa viðfarnan.

– Vit hava viðgingið, at nakað fór á sjógv og tá áttu vit at fingið loyvi at fara. Løgreglan gav okkum eisini loyvi at fara. Men tá noktaði Tórshavnar Býráð okkum at loysa og tað varð alt gjørt fyri at forða okkum mest møguligt.

– Vit góvu teimum fult yvirlit yvir tangar og, hvussu nógva olju, vit høvdu bunkrað og, hvussu nógv var í skipinum.

– Tá fekk eg eisini at vita, at onkur var farin í land við maskindagbókini og oljujournalini.

– Hetta varð bara gjørt fyri at draga tíðina út. Men tað er ólógligt at flyta bøkurnar av skipunum og tí ringdi eg til sakføraran og kravdi at fáa tær aftur beinanvegin. Tað endaði við, at sakførarin kom sjálvur aftur við teimum.

### Kravdi 100.000 krónur

Jákup Olsen sigur, at nú kravdi Tórshavnar Býráð, at Hvannaberg skuldi betala 100.000 krónur í trygd fyri útreiðslurnar av taka oljuna upp, áðrenn hann slapp at loysa.

– Vit hava viðgingið, at tað fleyt yvir hjá okkum og tað eru vit eisini sinnaðir at betala fyri. Men at geva okkum skyldina fyri oljudálkingina á Havnarvág og at halda okkum aftur ein heilan dag, finna vit okkum ikki í, so tað fara vit at krevja endurgjald fyri.

Tað endaði við, at Hvannaberg slapp avstað aftur klokkan fimm hósdagin- uttan at betala nakra trygd frammaundan.

Reiðarin sigur, at tað hendir ofta, at tað flýtur yvir, tá ið skip bunkra, men at blása hetta upp til eina gølu, er at gera nakað nógv burturúr.

# Óvist um vindmyllurnar á Strondum sleppa at binda í

**– Royndirnar higartil hava víst, at tað loysir seg ikki at seta vindmyllur upp í Føroyum, sigur Stjórin í SEV**

VINDORKA
*Áki Bertholdsen*



*– Skulu vit keypa streym frá einum vindmyllufelag á Strondum, skal streymurin vera bíligari enn streymurin, sum vit annars gera við vatnorkuverkun um og motorverkunum. Og higartil hevur niðurstøðan verið, at tað loysir seg ikki at hava vindorku í Føroyum, sigur Klæmint Weihe, stjóri í SEV*

Tað er ikki vist, at vindmyllurnar, sum ætlanin er at seta upp á Strondum, sleppa at binda í hjá SEV.

Sum vit greiddu frá í sosialinum í gjár, eru tað tey bæði, danska vindmyllufelagið Wincon og Óli Gordon Bech, sum ætla at seta fleiri vindmyllur upp á Strondum.

Men fyri at sleppa av við streymin er tað neyðugt at binda í netið hjá SEV.

– Hetta er ein spurningur, sum stýrið fyri SEV má taka støðu til, tá ið ein umsókn kemur. Og mær kunnugt er ongin umsókn komin, og fyrrenn hon kemur, hevur hann onki ítøkiligt at taka støðu til sigur Klæmint Weihe, stjóri Í SEV.

Tí dugur hann heldur ikki at siga enn, um myllurnar sleppa at binda í hjá SEV.

– Men hann visir á, at royndirnar, sum SEV sjálvt hevur av vindmyllum í Føroyum, vísa, at tað er meiri enn ivasamt um tað loysir seg at seta vindmyllur upp í Føroyum og at tað er neyðugt at hugsa seg sera væl um, áðrenn loyvi verður givið til at binda í.

### Loysti seg ikki

SEV hevur sjálvt gjørt royndir við vindmyllum fyri at vita, hvussu tær rigga í Føroyum og um tær eru ein nýtilig orkukelda afturat, ella ístaðin fyri vatnorkuna og motorverkini hjá SEV.

– Royndirnar vit gjørdu, vísa, at tað ber væl til at gera orku burturúr vindi í Føroyum. Men tað eru fleiri onnur viðurskifti sum gera, at vit ikki hava viljað lagt nakran dent á at útbyggja vindorkuna.

SEV stjórin sigur, at royndirnar vístu, at fíggjarliga loysti tað seg ikki at vinna streym úr vindmyllum, tí prísurin á streymurin frá vindmyllunum er ikki kappingarførur við streymin frá vatnorkuverkunum og motororkuverkunum.

– Harumframt vísti tað seg at tað var ógvuliga dýrt at seta vindmyllur upp og somuleiðis er tað ógvuliga avmarkað, hvussu nógv kann gerast av streymi frá vindmyllum, tí netið í Føroyum er so lítið.

Og at enda eru tað teir harðu stormarnir í Føroyum gera seg galdandi.

Tað eru serliga hesi trý viðurskiftini, kostnaðurin, støddin á netinum og veðurlagið, sum gera, at SEV hevur lagt vindorkuna á hyllina.

Men samstundis ásannar hann eisini, at síðani SEV gjørdi sínar royndir, hevur stór menning verið í vindmyllu ídnaðinum so at roknistykkið batnar.

Men enn metir SEV ikki, at prísirnir á vindorku í Føroyum eru kappingarførir við tað, sum tað kostar at gera streym burturúr teimum orkukeldum, sum SEV hevur nú, tvs, burturúr vatni og dieseloljuverkum.

– Tann vitanin, vit hava fingið um vindorku hesi seinastu nógvu árini, siga okkum, at vit skulu vera sera varin, áðrenn vit fara í holt við vindorku.

So tá ið Óli Gordon Bech lovar, at teir kunnu levera streym fyri helvtini av tí, sum streymurin nú kostar, er hann meiri enn ivasamur.

– Eg vænti, at teir eru á skeivari leið, um teir halda, at teir kunnu selja okkum streym fyri helvtina av tí, sum annars kostar okkum at gera streym.

– Og skulu vit keypa streym frá øðrum má tað vera endamálið at vit fáa hann fyri minni enn tað, tað annars kostar okkum at gera streym. Vit fara ikki at keypa streym frá øðrum, um hann kostar meiri enn vit sjálvir kunnu gera hann fyri, tað sigur seg sjálvt, sigur Klæmint Weihe.





*Hjá BP eru framvegis vónir at gera oljufund*

*Mynd: Jon Hestoy*

# BP funnið oljuspor – Statoil helst einki funnið

**Hóast vónirnar til verulig oljufund í teimum báðum fyrstu brunnunum hjá Statoil og BP minka sum tíðin gongur, meta serfrøðingarnir hjá Amerada Hess, sum fer undir triðju boringina við Føroyar um stutta tíð, at góðir møguleikar eru at finna olju**

OLJULEITING/-ANALYSA
*Jan Müller*

Statoil-samtakið hevur eftir øllum at døma, hvørki funnið gass ella olju í føroysku undirgrundini. Hetta tykist at vera úrslitið av tí umleið 200 mill. kr. dýru boringini. Keldur Sosialurin hevur tosað við kunnu vátta, at Statoil heldur óvæntað kom niður á eina sill nakrar hundrað metrar frá tí endaliga málinum. Men áðrenn blaðið fór til prentingar í gjár varð framvegis borað, og hetta skuldi tá vera í leysari tilfari. So hóast tað ljóðar, at Statoil er farið at rigga av á hesum sinni, skilst, at vónirnar tó ikki eru heilt sleptar. Úrslit ella ikki, so hevur Statoil uttan iva fingið týðandi upplýsingar, sum kunnu brúkast í sambandi við komandi boringar og sum kunnu geva ábendingar um, uppá gott og ilt, hvussu undirgrundini sær út.

Tjúkkar basaltfláir ella einstakar sillir hava annars verið marran hjá øllum jarðfrøðingum, sum arbeiða við føroysku landgrundini. Hóast seismikkur í dag er sera framkomin og kann hjálpa oljufeløgunum langt á leið, so er altíð knýtt óvissa at hesum kanningarhátti, og tí sigur man eisini, at bara ein boring kann við vissu siga, um olja er til ella ikki.

Keldurnar blaðið hevur tosað við siga, at tað, sum uttan iva er hent í Statoilboringini er nettupp tað, at seismikkurin hevur »snýtt«. Tvs. at tað, sum jarðførðingarnir hava roknað við og vónað, mundi vera ein strukturur, eitt møguligt oljureservoir í undirgrundini, eftir øllum at døma hevur verið ein sill, basalt. Hetta er eisini nakað, sum líkist tí, ið vælvitandi keldur upplýsa fyri blaðnum Fregnum í gjár, tó at tað framvegis ikki er váttað, at so er.

Í gjár fór útgerðarskip út á Sovereign Explorer við eitt nú loggingútgerð. Hetta er mátiútgerð, sum verður brúkt, tá ein boring er um at verða liðug. Áðrenn proppur verður settur í verða tól koyrd niður í holið fyri at gera tær seinastu mátingarnar. At henda útgerðin fer umborð nú kundi tí verið enn eitt ítøkiligt tekin um, at teir eru við at rigga av á Sovereign Explorer. Tað tekur so nakrar dagar.

### BP borar enn

Hóast tað er nærum ómøguligt at fáa nakrar upplýsingar um hina boringina, hana hjá BP og Shell, so veit Sosialurin frá vælvitandi keldum, at West Navion framvegis borar, og at tað eftir ein steðg í farnu viku, tá onkrir trupulleikar vóru, nú nærkast endaliga málinum. BP skal hava steðgað boringini í fleiri dagar fyri at fáa okkurt, sum kom skeivt fyri í brunninum, uppá pláss aftur. Tað skal so vera orsøkin til, at BP í vikuni upplýsti fyri Sosialinum, at boringini helst fór at taka einar tvær vikur longri enn ætlað. Tað frættist annars, at BP er ikki komið í basalt av tí slagnum sum Statoil.

Sum skilst hevur BP heldur onga olju funnið enn. Men keldurnar hjá blaðnum vilja vera við, at teir hava funnið oljuspor (oilshows) á leiðini niðureftir. Hetta kann hava stóran týdning fyri víðari leitingina á føroyska økinum, tí tað merkir, at her er ein virkin oljuskipan. Tvs. at olja einaferð í forðum er vorðin til her, men spurningurin er so, um jarðfrøðin er soleiðis háttað, at oljan framvegis liggur goymd í undirgrundini. Tað er tað, sum oljufeløgini ikki vita, og tí mugu bora.

Sum sagt varð frá í blaðnum í vikuni, kundi sumt bent á, at hesar fyrstu boringarnar á landgrunninum fara ikki at gera Føroyar til oljutjóð. Tá tað er sagt, so stendur tó eftir at frætta, hvussu fer at ganga hjá BP teir seinastu hundrað metrarnar niður móti tí endaliga málinum. Tíðindini um basalt úti í »gullhorninum« tvs. økinum, har flestu av loyvunum eru givin, koma eitt sindur dátt við, men kortini ikki heilt óvantað. Tí nettupp grót av vulkanskum uppruna er marran hjá einum og hvørjum jarðfrøðingi, sum arbeiðir ella hevur arbeitt í føroyska økinum.

Higartil hevur verið hildið, at basaltið, sum verður tjúkri jú nærri vit koma Føroyum, minkar tess longur vit koma frá landi og bara gongur út til eitt vist, og at økini nær markinum eru meira ella minni basaltfrí. Statoilboringin kann fara at vísa, at hetta ikki so. Tvs. at tað møguliga finnast basaltfláir og sillir ymsa staðni í undirgrundini heilt suður og eystur móti markinum. Tað kann minka um sannlíkið at finna lønandi oljufelt her ella kann tað í hvussu er gera tað nógv torførari at finna oljuna.

### Hess góðar vónir

Um stutta tíð fer Amerada Hess-samtakið undir sína fyrstu boring. Henda hevur kanska serstakan áhuga fyri føroyingar, tí føroyska oljufelagið Atlantic Petroleum er við í samtakinum. Brunnurin Marjun hjá Hess liggur longri burt frá Føroyum, tvs. at hann møguliga liggur longur burtur frá basaltinum. Tískil skuldi møguleikin hjá Amerada Hess at troffið við basalt verið minni sannlíkur. Steve Boldy, stjóri í felagnum sigur við Sosialin, at teir meta seg hava fatur á einum strukturi, sum víkir nakað frá hinum hjá Statoil og BP, og at teir hava rættiliga góðar vónir at finna olju har. Hann liggur heldur ikki so langt frá markinum og harvið teimum kendu oljufeltunum hinumegin markið. Hjá Hess meta tey seg eisini at hava gjørt sítt heimaarbeiði so mikið væl, at tey bera ikki ótta fyri, at tað teir veruliga síggja er basalt. – Vit eru rættiliga vísir í, at her eru møguleikar at finna olju sigur Steve Boldy við Sosialin.

### 8 brunnar

Hóast hesar fyrstu ikki almennu útmeldingarnar um fyrstu oljuleitingina við Føroyar nakrantíð ikki eru serliga hugaligar hjá teimum, sum hava sett stórar vónir til eina komandi oljuvinnu, so er greitt, at talan enn bara er um fyrstu boringarnar av tilsamsans átta, sum oljufeløgini hava bundið seg til. Nógv kann broytast. Og nettup í oljuleiting hevur tað oftani verið so, at júst tá tú minst gáar um tað, verður troffið við olju.

Men tað ringasta, sum kann henda, er sjálvandi, um óttin fyri, at basalt eisini finst í »basaltfríu« økjunum, gerst veruleiki. Tá kann tað so aftur minka um vónirnar at finna olju undir tjúkku basaltfláunum nærri Føroyum, eitt nú har vit finna fleiri av 9-ára loyvunum.

Men oljusporini, sum BP/Shell hava funnið, prógva so, at her finst ein virkin oljuskipan. Og tað eigur í hvussu er at geva oljufeløgunum, sum skulu bora fleiri brunnar, nakað positivt at ganga eftir. Um tað er nokk til at fara undir fleiri brunnar í hundrað millióna klassanum er so ein annar spurningur, ið vit kanska fáa svaraðan næstu tíðina.

Tøkk

Listastevna Føroya 2001 takkar

Áskoðarum og áhoyrarunum fyri góða undirtøku
Listarfólkunum, sum luttóku

Grunnum og stuðlum fyri
dyggan fíggjarligan styrk:
Norðurlandahúsinum
Mentamálastýrinum
Tórshavnar Býráð
Mentanargrunni Landsins
Fjølrit

Nordisk Kulturfond
Menntamálaráðuneytið Íslands
Menntamáladeild Reykjavíkur
Nomus
Fitur
Dans og Teater i Norden
Grunninum Nuuk-Tórshavn-Reykjavík

Føroya Banka
Dimmalætting
Atlantic Airways
Faroe Seafood
Føroya Tele

Øllum samstarvsfeløgum, sum gjørdu sítt til,
at Listastevnan gjørdist veruleiki

Vit hittast aftur 3.-18. august 2002

listastevna føroya

TØKK
NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM 2001
art festival